

– Tað var ikki ætlanin, at vit skuldu fara avstað aftur. Vit tosaðu um, at eg skuldi fáa mær eitt starv uttanlands, áðrenn eg kom heim, men nú vit vóru komin heim, kundu vit hugsa okkum at verið verðandi. Men eg gleðist hóast alt um, at eg havi fingið eitt nýtt starv, sigur Jóannis Fonsdal, sum í gjár tømdi íbúðin hjá sær í Havn. Hann skal nú starvast sum prestur í Keypmannahavn.

Mynd: Bárður Lydersen

# Jóannis má av landinum fyri at verða prestur

**Fráfarni hjálparpresturin í Havn fer í morgin av landinum saman við familjuni hjá sær. Jóannis Fonsdal skal næstu árini starvast í eini kirkju í Keypmannahavn, og hóast ætlanin ongantíð var, at hann skuldi av landinum aftur, lagaðu umstøðurnar seg soleiðis, at hetta gjørdist neyðugt, skuldi hann halda fram sum prestur**

PRESTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Hesa vikuna hava presturin Jóannis Fonsdal og konan Sigrid rokast ófórt í íbúð teirra Yvir við Strond í Havn. Hóast tey hildu seg vera komin heim til Føroya at búgva fyri well, eftir at tey høvdu verið 10 ár í útlandinum, fara tey nú aftur av landinum.

Íbúðin hjá teimum verður tømd, og í morgin fara tey bæði og tey trý smábørnini av landinum.

– Tá ið vit fluttu heim eftir 10 ár í útlandinum, var tað eitt stórt umskiftið, og vit skuldu venja okkum við at búgva í Føroyum aftur. Ætlanin var at verða verandi her, men nú fara vit til Danmarkar aftur. Hetta krevur eitt sindur av okkum, sigur Jóannis Fonsdal.

### Starvið bleiv burtur

Orsøkin til, at Jóannis Fonsdal og familjan fara av landinum aftur er, at starvið hjá Jóannisi sum hjálparprestur í Havn varð niðurlagt. Almenna grundgevingin var, at pengar vóru ikki longur til hetta starv.

Aðrir prestar hava tó róð fram undir, at veruliga orsøkin til, at starvið varð tikið burtur, var, at Jóannis Fonsdal segði seg ikki kunna samstarva við tveir aðrar prestar í Havn, tí annar er kvinna og hin er giftur uppaftur.

So seint sum í bløðunum í gjár skrivaði Hans Eiler Hammer, sóknarprestur í Klaksvík, at Jóannis Fonsdal hevði fingið eitt asnaspark úr føroysku fólkakirkjuni, og at veruliga orsøkin til, at hann misti starvið, var, at hann var trúfastur ímóti skriftini.

### Væntar bleyta lending í Emdrup

Tað er í øllum førum greitt, at tíðin hjá Jóannisi Fonsdal sum prestur í Føroyum er av fyribils. Hann hevur fingið starv við Emdrup Kirke, sum liggur í útnyrðingspartinum av Keypmannahavn.

– Eg var í praktikk í kirkjuni fyri nøkrum árum síðani, og nú tey søktu eftir einum presti, valdi eg at søkja starvið. Tað vóru fleiri aðrir umsøkjarar, men eg fekk tað, og tað eri eg glaður fyri, sigur Jóannis Fonsdal.

Hvussu verður við tínum átrúnaðarligu sjónarmiðum í hesari kirkjuni?

– Eg havi hildið eina prædiku í kirkjuni, og aftan á var eg til ein langa samrøðu, har kirkjuráðið spurdi um alt millum himmal og jørð, og eg svaraði sum frægast. Tey høvdu fleiri umsøkjarar at velja ímillum, men valdu at seta meg, so eg vænti mær ongar trupulleikar.

### Noyðist av landinum fyri at fáa starv

Prestastarvið í Emdrup Kirke verður eitt sindur øðrvísi, enn tað starvið, sum Jóannis Fonsdal hevur havt í Føroyum.

– Í Føroyum snýr tað seg nógv um gudstænastuna sunnudag og so onkrar jarðarferðir mitt í viku. Men í kirkjuni í Emdrup er stórt virksemi alla vikuna. Tey hava góðar umstøður at hýsa øllum hugsandi aktivitetum, og har eru fleiri fólk í starvi, sigur Jóannis Fonsdal.

Tey, sum hava hug at vita meira um kirkjuna, har Jóannis Fonsdal nú skal starvast, kunnu leita sær inn á heimasíðuna www.emdrupkirke.dk

### Vónar at koma heimaftur

Men hvussu er lagið, nú tit fara av landinum aftur?

– Tað var ikki ætlanin, at vit skuldu fara avstað aftur. Vit tosaðu um, at eg skuldi fáa mær eitt starv uttanlands, áðrenn eg kom heim, men nú vit vóru komin heim, kundu vit hugsa okkum at verið verðandi. Men eg gleðist hóast alt um, at eg havi fingið eitt nýtt starv.

– Skuldi eg halda fram sum prestur, so mátti tað verða uttanlands. Tað er avmarkað við størvum í Føroyum, og í løtuni er einki starv leyst.

Men vónar tú at koma heimaftur at verða prestur?

– Ja, vit eru føroyingar, og eg vil eisini, at børnini hjá mær verða føroyingar. So eg vóni, at vit innan alt ov leingi kunnu flyta heimaftur til Føroya.

## Føroyskar gentur við í MGP

**9 ára gomlu Rebekka og Camilla skulu verða við í danska Barnagrandprixnum, sum verður hildið í næsta mánaði**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tá ið danska Barnagrandprixið – sum gongur undir navninum MGP – verður hildið tann 17. september, verða tvær føroyskar gentur við á pallinum.

Ein av bólkunum, sum fer at syngja, er úr Herlev, og millum tær seks genturnar eru tvær føroyskar.

Genturnar, sum syngja, eru Karoline og Zoe, og síðani skulu fýra gentur úr flokkinum hjá teimum dansa. Onnur teirra er Rebekka, og hin er Camilla. Mamma Rebekku er Sanna Smith, og Camilla er dóttir læknan Jens Paula Marstein.

Sangurin hjá gentunum úr Herlev kallast »Et Stjerneskud«, og tað er einasta ballada í rúgvuni av nógvum lívligum poppsangum til MGP 2005.

Gentubólkurin er Herlev er yngsti bólkurin, sum er við til MGP í ár.

## Roskilde vil hava uppskot

Fyrireikararnir av Roskilde Festivalinum vilja gjarna frætta frá fólki, hvørjar bólkar tey kundu hugsa sær at hoyrt á festivalinum næsta ár.

Roskilde Festivalurin ynskir sær bæði uppskot um kend heimsnøvn og um nýggjari bólkar.

Føroyingar eru ídnir at vitja festivalin í Roskilde, og tað kundi saktans hugsast, at føroyingar vildu hoyrt ein føroyskan bólk á festivalinum næsta ár, sum verður hildin í døgunum frá 29. juni til 2. juli

Onkrir føroyingar hava spælt á Roskilde Festivalinum. Millum annað var Clickhaze við fyri nøkrum árum síðani, og Teitur Lassen hevur eisini roynt seg á størsta danska festivalinum.

Uppskot um bólkar kunnu lata Roskilde Festivalinum umvegis heimasíðuna hjá teimum www.roskildefestival.dk

**ek**